ARBEIÐSEFTIRLITIÐ
*Administration of Occupational Safety and Health*
Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands
Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo

*Skrásetingar nr.:*

**L-E012-4**

# Leiðbeining um krabbameinselvandi evni og tilfar

### *Alment.*

Umleið 100 nýggir tilburðir av krabbameinssjúkum standast árliga í Føroyum. Skrásetingin av krabbameinstilburðum byrjaði í Føroyum í 1978, men enn er ov lítið fráliðið til at nøkur niðurstøða kann gerast um, hví slíkar sjúkur eru íkomnar, - um tað er arbeiðsumhvørvið ella annað, sum er atvoldin til sjúkurnar.

Skrásetingin er gjørd eftir somu fyriskriftum sum í hinum Norðurlondunum, men eini 20 ár skulu ganga áðrenn tilfarið er so mikið rúgvismikið, at niðurstøða kann gerast.

Í Danmark verða árliga 25.000 nýggir tilburðir av krabbameinssjúkum skrásettir. Teir serkønu meta, at í 80-90 % av førunum er tað umhvørvið, sum er atvoldin til sjúkurnar.

Vit eru fyri krabbameinselvandi evnum í mati og njótingarevnum - eitt nú í tubbaki og rúsdrekka. Tó eigur arbeiðsumhvørvi okkara eisini sín part í økta talinum í vøkstrinum av krabbameinssjúkum.

Flestu krabbameinssjúkur í arbeiðsumhvørvinum eru grundaðar á evnafrøðilig evni og evnafrøðiligt tilfar. Nøkur evni eru so vandamikil, at bert evarsliga smáar mongdir kunnu verða orsøk til at fólk fáa krabbameinssjúkur.

Samanumtikið er galdandi fyri krabbameinselvandi evni, at vandi er á ferð, hóast talan er um smáar mongdir. Bert verður vandin størri - jú størri mongd tú verður fyri, eins og jú longri tíð tú arbeiðir við slíkum.

### *Hvussu kenna vit evnini aftur?*

1. ***Lesið á innballingini.***
   Legg merki til um setningurin á innballingini: "Kann elva til krabbamein" (R45), er viðmerktur. Gevið gætur: ikki øll krabbameinselvandi evni eru merkt við slíkari ávaring.

***Lógarheimild:***

Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.
Kunngerð nr. K-E012-2 um evni og tilfar frá 25. august 1983.

| *Útgivið fyrstu ferð:* | *Seinastu broytingar:* |
|---|---|
| **30. juni 1989** | **11. september 1996** |

2. ***Lesið brúkaraleiðbeiningina.***



Um eitt evni inniheldur minst 0,1 % av einum krabbameinselvandi evni, sum er skrásett á krabbameinslistanum hjá Arbeiðseftirlitinum, skal tað viðmerkjast í brúkaraleiðbeiningini. Í leiðbeiningini skal eisini viðmerkjast, hvussu evnið skal handfarast og hvørjir vandar eru til staðar.

**3.** ***Um merking og brúkaraleiðbeining ikki er til,*** og tú hevur varhugan av at arbeitt verður við krabbameinselvandi evni ella framleiðslu, so er best at seta seg í samband við trygdarumboð ella sølumann.
Tað ber eisini til at ringja til Arbeiðseftirlitið fyri at vita um evni er vandamikið, og hvussu ein skal handfara tað.

**4.** ***Krabbameinsskráin hjá Arbeiðseftirlitinum.*** Henda skrá fevnir um evni, ið skjalfest prógv er fyri, at tey kunnu elva til krabbameinssjúkur hjá menniskjum og royndardýrum.
Skráin, nr. 3.1.0.2 fæst við at venda sær til Arbeiðs-eftirlitið.

***Brúkaravegleiðing.***

Útvegarin, sum letur vandamikið evni og tilfar, skal útflýggja brúkaravegleiðing á føroyskum ella donskum máli.

Arbeiðsgevarin skal gera uppskot til brúkaravegleiðing til arbeiðsfólkið, sum fevnir um arbeiði, ið evni ella tilfar verða nýtt til á virkinum.

***Evni og tilfar at seta í stadin fyri.***

Krabbameinselvandi evni og tilfar skal ikki nýtast um onnur evni og tilfar eru til at taka, ið eru minni vandamikil.

***Hvat er til at taka?***

Verður arbeitt við krabbameinselvandi evni og tilfari á einum virki, er umráðandi at hugsa seg um. Ber til at taka burtur og seta annað evni ella tilfar í staðin fyri tey vandamiklastu, eigur tað at verða gjørt.

Slepst ikki undan at nýta vandamikið evni ella tilfar, er so møguleiki fyri at avbyrgja tær arbeiðs-uppgávur, har vandamikla evni ella tilfari verður nýtt?

Ber til at seta upp útsúgvingarverk, sum forðar fyri dálking?

Seinasta loysnin er at nýta persónliga verndarútgerð.
Tað er umráðandi at forða fyri, at evni ella tilfar kemur í samband við holdið ella at tú andar tað í

teg.

***Fáið skil á evnafrøðiligu evnunum***.

Tað er neyðugt á einum virki at gott yvirlit er yvir evni og tilfar, sum verða nýtt í arbeiðinum.

Í hvørjum arbeiðsgongdum verða evni og tilfar nýtt?



Verða nýtt fleiri sløg av evnum og tilfari til somu arbeiðsgongd? Hvørji av hesum evnum eru meira vandamikil enn onnur?

Hvussu stórar mongdir verða nýttar av hvørjum einstøkum evni og tilfari?

Er brúkaraleiðbeining til øll vandamikil evni og alt vandamikið tilfar? Ein gjøgnumgongd av tí tilfari, sum virkið hevur á goymslu, kann geva nágreiniligt svar upp á hesar - og aðrar týdningarmiklar spurningar.

Skrásetingin gevur møguleika fyri at velja minst vandamikla evni ella tilfari - eisini at kunna beina fyri teimum mest vandamiklu. Tað gevur samstundis trygd fyri skilabetri og ódýrari loysnum, tá farið verður til handils.

Trygdarumboðið á virkinum skal takast við í ráðum, tá slíkar broytingar verða framdar.

Ofta er neyðugt at leita sær ráð aðrastaðni. Gjøllari frágreiðing fæst hjá:
- Handilsmanninum
- Ráðgevandi virkjum
- Tøknifrøðiligum stovnum
- Arbeiðseftirlitinum
- Arbejdstilsynets Kemi-service, Danmark, tlf. 31299711

***Ávísing***.

Arbeiðseftirlitið hevur givið út ymiskt tilfar m.a. um evni og tilfar:

| | |
|---|---|
| - *Reglugerð um markvirði fyri* evni og tilfar | *Nr. R-E012-1.* |
| - *Leiðbeining um markvirði fyri evni og tilfar* | *Nr. L-E012-2.* |
| - *Brúkaraleiðbeining um evni og tilfar* | *Nr. L-E012-3.* |
| - *Leiðbeining um krabbameinselvandi evni og tilfar* | *Nr. L-E012-4.* |
| - *Leiðbeining um fyriskipan móti heilsuskaða í samband við málaraarbeiði* | *Nr. L-E012-5.* |
| - *Leiðbeining um brúk av Calciumcyanid (Blásýru) í vakstrahúsi v.m.* | *Nr. L-E012-6.* |
| - *Leiðbeining um útflýgging, goymslu, handfaring og persónligari verndarútgerð í samband við eiturevni* | *Nr. L-E012-7* |
| - *Umfarsskriv um byggitilfar* | *Nr. U-E012-1* |
| - *Umfarsskriv um niðurtøku av tilfari, sum inniheldur asbest* | *Nr. U-E012-2* |

Nágreiniligari upplýsingar fáast við at venda sær til Arbeiðseftirlitið, Fútalág 1B, P.O.Box 1134, FR-110 Tórshavn, Telf. 318711, Fax 314489.

Arbeiðseftirlitið er eisini til reiðar við upplýsingum og ráðgeving um ymisk skeið, ið verða hildin í Føroyum og Danmark - eisini um evnisdagar um evni og tilfar, sum verða skipaðir í Føroyum av og á.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**, 30. juni 1989.

Eli Davidsen, stjóri (sign.)